Bilarnir í "Kringvarpsgarasjuni":

# Sportligur Honda og crossover frá Nissan

**Bilarnir sum vórðu umrøddur í útvarpssendingini "Bylgjan" í Kringvarpi Føroya mikudagin 28. mars, vóru tveir sera ymiskir bilar, ein Honda Civic og ein Nissan Quashqai**

BILAR

Í útvarpssendingini "Bylgjan" mikudagin í Kringvarpi Føroya vórðu tveir sera ymiskir bilar umrøddir: Honda Civic 1,8 Sport og Nissan Quashqai (úttalað Kasskai). Felags fyri hesar bilar var at báðir høvdu teir bensinmotor við 140 hk og 6 gir.

Honda Civic 1,8 Sport er ein lágur og sportligur hatchback við ógvuliga sermerktum designi, bæði innan og uttan. Hóast Civic sær meira út sum ein sportbilur er hann eins nógv ein familjubilur sum t.d. Mazda 3 og Toyota Corolla hatchback. Civic verður eisini gjørdur í eini heilt serligari sportútgávu, Type R, við yvir 200 hk og koyrir frá 0-100 km/t upp á 6,6 sek. Bilurin, sum varð royndarkoyrdur, kostar 255.000.

Bíligasti Honda Civic kostar 235.000.

Nissan Qashqai er ein sonevndur Crossover - ein blanding av einum hatchback, stationcar og SUV (Sport Utility Vehicle). Hann er væl hægri enn ein vanligur persónbilur. Bilurin, sum varð royndarkoyrdur, hevði panorama glastak og leðurkabinu og kostaði 328.000. Bíligasti Nissan Qashqai kostar 239.000.

Tað var útvarpsmaðurin Kári Sólstein, sum legði bilprátið til rættis. Hann tosaði við Sofus Hansen, bilfjepparа, og Óla Jákup Rólantsson og Magnus Gunnarsson, frá bilredaktiónunum á ávikavist Vikublaðnum og Sosialinum.

*mg.*



*Nissan Quashqai og Honda Civic vórðu umrøddir í úrvarpssendingini "Bylgjan" í Kringvarpi Føroya mikudagin 28. mars*



*Honda Civic er ein sermerktur og sportligur hatchback við 5 hurðum*



*Nissan Qashqai er ein sonevndur Crossover - ein blanding av einum hatchback, stationcar og SUV*

# Nýggjur Renault Twingo

**Eftir at hava verið á marknaðinum í 14 ár, varð ein nýggjur Renault Twingo presenteraður á bilaframsýningini í Geneve.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Nýggi Renault Twingo verður nakað størri enn forgangarin og kemur at fáast bæði sum bensin og diesel*

Gamli Renault Twingo verður skjótt avloystur av einum heilt nýggjum bili við sama navnið. Twingo eru seldir í yvir 2,4 milliónum eindum, síðan teir fyrstu ferð komu á marknaðin í 1993.

Hóast nýggi Twingo er eitt sindur størri enn forgangarin, er hann ikki nakar stórur bilur, men innrættingin er liðilig, og bilurin er sera rúmligur í mun til støddina..

Nýggi Twingo verður gjørdur bæði sum bensin og diesel, t.d. við einum nýggjum TCE (Turbo Control Efficiency) benzinmotori við 100 hk og einum 1.5 dCi dieselmotori, ið er sera orkusparandi og umhvørvisvinarligur.

Eins og á forgangaranum kann baksetrið flytast aftur og fram, soleiðis at tað ávirkar plássið við baksetrið og støddina á viðførisrúminum. Twingo fær nógvar innbygdar trygdarskipanir, sum verja tey ferðandi til undir koyring.

Her hjá okkum og í Danmark hava Twingo ikki verið seldir í fleiri ár, men í nógvum øðrum londum eru teir á marknaðinum enn.

# Toyota Auris komin




Leygardagin 24. mars var opið hús hjá Reyni Service í Hoyvík og í Klaksvík í sambandi við at nýggi Toyota Auris, sum avloysir Toyota Corolla, er komin til landið.

Nógv fólk nýttu høvið at støkka inn á gólvið og royndarkoyra bilin. Vit hava eisini royndarkoyrt bilin, sum er ein virðiligur avloysari fyi Corolla, ið er ein av heimsins mest seldu bilum nakrantíð.

*Meira um Toyota Auris í einum komandi blað.*

*mg.*